# Fýra jólatrø frá okkum til tín

Fýra handlar, sum eru serfrøðingar at pynta og hugna um á jólum, fingu fríar teymar at pynta hvør sítt jólatræ til Rákið. Her skuldi verið ovmikið av íblástri til tín og mín, tá vit fara at pynta jólatræið heima í stovuni

*Lagt til rættis: Inna Törnroos*
*Mynd: Jens  Kristian Vang*



## Blómu-handilin Flora

Klaksvíksv. 63, Klaksvík

Nissur, 79 kr.
Kúla, 40 kr.
Glashjarta, 25 og 32 kr.
Dúkur, 579 kr.







### Barnaeygu glógva

Systrarnar Rúna og Gunvør Reyðberg er í barnsliga lagnum. Gunvør, sum bleiv mamma fyrr í ár, hevur tí valt eitt barnavinarligt jólatræ.

– Hevði eg pyntað hetta træið fyri einum ári síðani, hevði tað avgjørt ikki sæð soleiðis út, sigur hon.